Limablað nr. 5 • 2020

# Eldri

Landsfelag Pensjónista




## OLAF HALDANSEN

Hóast skjótt 90 ár, so arbeiðir Olaf enn 8 til 10 tímar hvønn dag

## KANÓNIRNAR Á NESI

Tvær stórar kanónir settar upp á Nesi undir seinna heimsbardaga

## VANDI Í ALLARI VÆLFERÐ

Arbeiðssamir pensjónistar duttu vegna aldur úr koronahjálparpakka

## OYS, OYS, HÁRIÐ ER PENT

Summi hata tær fyrstu gráu strýggirnar, onnur elska tær

**Blaðið Eldri**
Einaferð um árið gevur Landsfelag Pensjónista út blaðið Eldri. Endamálið við blaðnum er at kunna pensjónistar og onnur um ymiskt, ið áhugavert er hjá eldri, heima sum uttanlanda, at lesa.

**www.eldri.fo**

**Ábyrgd**
Beate L. Samuelsen, forkvinna

**Samskipari**
Gunnleyg Durhuus, skrivari og samskipari

**Umbróting**
Grafikmaster / Kári við Rættará

**Prent**
Scan Design ApS

## Landsfelag Pensjónista

Landsfelag Pensjónista er felag fyri allar pensjónistar og øll eldri í Føroyum. Limir í Landsfelagnum eru pensjónistafeløg og eldrafeløg í Føroyum. Landsfelagið hevur til endamáls at arbeiða fyri fíggjarligum, sosialum, mentanarligum og øllum øðrum áhugamálum pensjónista.

**Landsfelag Pensjónista**
**Løkjatún 1,**
**FO-160 Argir**
**Tel: 21 93 94**
**T-postur: lp@eldri.fo**
**Heimasíða: www.eldri.fo**


NEVNDIN 3

ANDAKT 4

VANDI Í ALLARI VÆLFERÐ 6

KASPARLIÐIÐ LIVIR Í BESTA VELGÅENDE 10

KANÓNIRNAR Á NESI 16

ÁRSVEITSLAN 2019 HJÁ LANDSFELAG PENSJÓNISTA 23

ARBEIÐANDI PENSJÓNISTURIN OLAF HALDANSEN 26

UPPSKRIFTIR: BLÓÐMØR OG RULLUPYLSA 32

AÐALFUNDUR HJÁ ELDRAFELAGNUM Á TOFTUM 33

SUNDA PENSJÓNISTAFELAG HAVT AÐALFUND 34

ÁRSFRÁGREIÐING 2019-20 LANDSFELAG PENSJÓNISTA 35

OYS, OYS, HÁRIÐ ER PENT 41

# LANDSFELAG PENSJÓNISTA HEVÐI AÐALFUND 24. OKTOBER 2020

**Tveir nevndarlimir stóðu fyri vali**

Á aðalfundinum stóðu tveir nevndarlimir fyri vali. Alfred Olsen varð afturvaldur og Hans Jacob á Kósini er nývaldur.

Aftaná aðalfundin skipaði nevndin seg soleiðis:

Beate L. Samuelsen, forkvinna
Ingeborg Vinther, næstforkvinna
Elna Lamhauge Strøm
Alfred Olsen
Hans Jacob á Kósini

Varalimir:
Lydia Laksafoss
Vibeke Ingvarsson
Jákup Hummeland

**Beate L. Samuelsen, forkvinna**
**Varðalág 4, 100 Tórshavn**
**samuelsenbeate@gmail.com**
**tlf. 313457 og 215457**

**Ingeborg Vinther**
**Geilin 38, 900 Vágur**
**vinther@mail.fo**
**tlf. 373427 og 573427**

**Alfred Olsen**
**Rókavegur 24, 656 Saltnes**
**alfred-olsen@kallnet.fo**
**tlf. 447960 og 210960**

**Elna Lamhauge Strøm**
**R. C. Effersøesgøta 8, Tórshavn**
**meind@kallnet.fo**
**tlf. 211591 og 322030**

**Hans Jacob á Kósini**
**Klaksvíksvegur 53,**
**700 Klaksvík**
**jacob@olivant.fo**
**tlf. 456146 og 220306**



***Aftast f.v: Alfred Olsen, Hans Jacob á Kósini og Elna Lamhauge Strøm. Fremst f.v: Ingeborg Vinther og Beate L. Samuelsen***

ANDAKT

# AFTURHORVANDI HYGGJA VIT FRAMEFTIR

**"Sum ein faðir er mildur mót børnum sínum, so er Harrin mildur mót teim, sum hann óttast." (Sálmur 103,13).**



*Jógvan Fríðriksson, biskupur*

Tøkkin vellir fram úr einum væl nøgdum og eyðmjúkum sinni. Hjástødd fyllir hon rúmið og ger løtuna unniliga. Tøkkin er skapandi, hon víðkar útsýnið og letur hurðar upp. Hon vísir vegin framá.

Tøkkin dregur gardinurnar frá vindeyganum, so vit síggja náttúruna í sínum litríka og skiftandi búna alt eftir árstíðunum.

Um várið varnast vit gróðurin og síggja lombini spæla. Lívið vaknar, og vit síggja hvør annan í vónríkum ljósi.

Summarsins lýðka gevur møguleikan til virksemi uttandura. Vit ganga túrar og hugna okkum í bøi og haga. Útferðir í bili ella bussi er ein møguleiki, um geingið bilar og sporini kennast tyngri.

Um heysti kemur summarsins gróður til sín rætt, og fullar løður veita føði myrkari dagar. Sjálvt veturin er livandi og unniligur, um vit hava heilsu at njóta løtuna. Vit mega liva, – ikki útseta lívið ella liva fyri at yvirliva.

Allar árstíðirnar kann tað óvæntaða henda eftir drúgvar myrkar løtur. Brádliga kemur ljósið inn í gjøgnum gluggan. Tað lýsnar, og stovan kennist ljós og unnilig. So mikið ljós, at vit síggja myndirnar á vegginum. Kend og elskað andlit. Sál mín Harranum lova, og alt, sum mær er í, heilaga navni hans. Tað er trúarinnar akker, at lívið er Guðs gáva. Hvørt menniskja er skapað í Guðs mynd. Hin einstaki hevur eitt óendaligt virði. Eitt virði, sum er. Eitt virði, ið ikki er til umrøðu ella skal metast um. Virðingin, hin treytaleysa virðingin, er útgangsstøðið. Tað byrjar við virðing, og loksins verða vit vegna Guð sjálvan og náði Guðs í Jesusi Kristi kosin verdug at vera.

At eygleiða lívið og njóta tilveruna. At síggja tað stóra í tí smáa. At varnast vísdómin í máliskuni: At døggdropin endurspeglar sólarljóman allan. At síggja vakurleikan og arbeiða við ljósinum. Vit kenna munin á at ganga við ljósinum inn í myrkrið, og so at ganga úr skýminginí inn í sjálvt vesturskinið.

Guð arbeiðir við ljósinum. Hjá honum er altíð ein vegur frameftir, nakað gott og trygt. Guð er ikki eitt vakmyndatól, ið fangar hvørt minsta frávik frá meginregluni. Guð er ævigur og trúfastur. Náði og kærleiki eru eyðkenni hansara.

Sál mín, Harranum lova, og gloym ikki allar vælgerðir hans. Vitnisburðurin hoyrist í kirkjum og samkomum, at móti okkum hevur Guð verið góður. Tað merkir ikki, at alt er gingið til vildar, at vit altíð hava verið frísk, at vit bara hava livað ljósar dagar.

Men tað merkir heilt einfalt, at Guðs góðska er góð góðar dagar, og hon er berandi tungar dagar á leiðini. Guðs góðska er ein hond at halda í, ið ber, tá ið á stendur.

At vera fagnaður og møttur við einum opnum føvningi. At síggja hitan í móttøkuni. Orð eru einans neyðug, tá ið vit ikki til fulnar skilja lívið, ella tá ið vit til fulnar skilja lívið og vilja siga eitthvørt, ið er størri enn alt. Tøkkin sigur tað, ið einans tøkkin kann siga. Sál mín Harra-num lova, og gloym ikki allar vælgerðir hans!

Tøkkin er altíð nútíð, sjálvt um løtan er farin. At takka ber í sær ein farra av ævinleika, tøkkin er ævinleikin. Tað ræður um at nýta møguleikan og njóta løtuna, tí hann lív títt frá grøvini loysir.

Lívið, ið einans er eina tíð, viknar og ferst. Tó, so er ævin endaleys, sjálvt um ætt eftir ætt søkkur undir mold. Vit eiga nakað, ið er størri enn løtan nú, vit eiga í trúnni á Jesus Krist lívið um aldur og ævir.

At lívið verður loyst frá grøvini hendir í okkara lívstíð. Vit fáa mót og áræði, sjálvt um løtur eru, sum einans eru, ella eru soleiðis, at vit ikki vóru til staðar. Tí viðhvørt eru vit til uttan at vera hjástødd í lívinum. Aðrar løtur eru vit hugtung, og náttarmyrkrið gongur í túninum uttan fyri vindeyga.

Og so kemur ljósið spakuliga afturíaftur. Eingin løta er so myrk, at ikki sólin rísur av nýggj-um. Tað er altíð ein framtíð. Í trúnni á Guðs miskunn fáa vit amboð at arbeiða við, ið flyta okkum framá.

Tað ræður um at síggja tað vakra og góða. Tað er gagnligt at hava eina ljósa trúgv og eina ljósa mynd av Guði. Tað er hóast alt ein møguleiki fyri mær!

Vit verða øll myndað av um-hvørvi og kringumstøðum. Hjá mongum okkara stendur barna-heimið í einum serligum ljósi. Friður, ró og vinarligar røddir. "Sum ein faðir er mildur mót børnum sínum, so er harrin mildur mót teim, sum hann óttast."

Fátt er sum faðir, einki er sum móðir. Mildleiki foreldranna og kærleikans hendur. Trúgvin er ljós av lyndi, og hon er endur-skin av Guðs veru. Vit lærdu okkara himmalska faðir at kenna sum ein góðsligan Guð, ið vil øllum væl, eisini teimum, ið vit onkursvegna ikki hildu av. Lærdu, at Guð ger ikki manna-mun.

Sjálvt um árstíðin er myrk og dagurin stuttur, syngja vit javnan morgunsálmin "nú skínur sólin bjarta og gyllir fjøll og líð." Sólin skínur altíð onku-staðni, og omanfyri skýggini er heiður himin.

"Takk fyri, at tú hevur, mín kæri góði Guð, // mær givið evni til títt verk at skoða; // fylg mær og ver tú hjá mær, tá eg nú fari út, // - nú sólin í fjøll og líð man roða."

Á vetri í dimmi og myrkum løtum vilja vit liva og yvirliva fyri at fagna vársins boðbera einastaðni fyri framman. Vit vilja liva beint nú, og ikki einans tá einaferð.

Amen.



# VANDI Í ALLARI VÆLFERÐ

**Arbeiðssamir pensjónistar duttu vegna aldur úr longda fíggjarliga koronahjálparpakka 2 landsins**

***Beate L. Samuelsen, forkvinna í LP***

Sum ein køvandi hond legði pandomiin Covid-19 land okkara næstan í coma í fleiri mánaðir. Hetta herviliga virus, sum á ferð runt heimin, rakti okkum í so meint, tó ikki so meint, sum tað rakti nógv onnur lond.

Higartil hevur Koronan í okkara landi ikki kravt lív. Nakrir fáir sjúklingar hava verið innlagdir, meðan vit hjartkipt hava fylgt við í miðlunum, hvussu herviliga sjúkan framvegis roynir at fáa fastatøkur á okkum. Her í heyst hevur hon tíverri aftur tikið dik á seg.

Sum ein ósjónligur óndur fylgisveinur hevur hon flutt seg úr einum landi til annað og víðari frá fólki til fólk. Politisku- og heilsumyndugleikar okkara hava líka frá fyrsta degi, Covid-19 gjørdi vart við seg, gjørt tað, teir eru mentir, at forða smittuni at spjaðast í føroyska samfelagnum.

Tað hevur eydnast so mikið væl, at slakað hevur verið eitt sindur í strongu tiltøkunum, sum vóru sett í verk á Grækarismessu, tá samfelagið lat aftur fyri øllum óviðkomandi vitjandi uttanífrá vegna smittuvandan.

Ein bólkur av borgarum okkara, sum kom at merkja hetta serliga meint, vóru tey okkara, sum eru meir og minni óhjálpin, og sum búgva á ellis- og røktarheimum.

## Veikari mótstøðuføri

Nógv av okkara gomlu skiltu einki av hesum. Bara tað, at verða avbyrgdur frá sínum nærmastu frá einum degi til annan, er ein ómenniskjanslig støða at koma í, hóast hetta var liður í verjuni móti herviligu smittuni.

At sita og veittra gjøgnum eitt vindeyga til síni nærmastu uttanfyri og ikki hava møguleikan at fáa eitt klemm ella ein muss, er neyvan hugaligt hjá teimum, vit eru góð við.

Hetta var ein trupul støða at koma í. Verri enn so skiltu øll eldri búfólk á eldrastovnum álvarsligu støðuna, tí álvarslig var hon, og álvarslig er




hon enn, nú framvegis avmarkingar eru, hvussu vitjandi skulu bera seg at, tá vit fara inn á eldrastovnarnar at vitja okkara kæru.

Uppaftur álvarsligari kann støðan gerast, um smittan verður borin inn á stovnarnar, tí vit, sum eru komin nakað upp í árini, hava munandi minni mótstøðuføri enn yngri røsk fólk.

## Aldurin ein forðing

Ikki bara hevur óttin fyri Korona rakt tey veikastu í samfelag okkara. Korona-óttin rakti eisini raskar, arbeiðssamar pensjónistar, sum framvegis hvønn dag eru virknir og vinna sær nøkur oyru eyka. Teirra arbeiðspláss og teirra fyritøkur noyddust í fleiri førum at snara lykilin um, og starvsfólkini vórðu send heim.

Tá politisku myndugleikarnir settu í verk fíggjarliga hjálp umvegis Arbeiðsloysisskipanina við einum sonevndum hjálparpakka 1, ja, so vóru 105 pensjónistar sendir til hús vegna Koronu. Hjálparpakki 1 var einans galdandi fyri starvsfólk undir 67 ár og ikki starvsfólk, sum vóru eldri. Tey kundu bara passa seg sjálvi, leggja seg á sofuna og hyggja upp í loft.

Hetta kom sera illa við hjá pensjónistum, sum løgtingsvalevnir á heysti 2019 lovprísaðu fyri teirra arbeiðssemi. Sambært teimum kundi samfelagið ikki klára seg uttan pensjónistaíkastið á arbeiðsmarknaðinum.

Hvussu var og ikki, so vóru somu arbeiðssomu pensjónistar gloymdir í fíggjarliga Koronahjálparpakka 1, sum í skundi var settur í verk í apríl.

Eftir at Landsfelag Pensjónista saman við øðrum rópti varskó, komu arbeiðssomu pensjónistarnir tíbetur við í fíggjarliga hjálparpakka 2.

## Aldurin ein forðing

Men, men. Ups. Tá trýstið á politisku myndugleikarnar gjørdist ov stórt til at halda fast við, at fíggjarliga koronahjálpin einans var galdandi til 30. juni, og freistin tí varð longd við tveimum mánaðum til 31. august 2020, gekk hetta enn einaferð út yvir pensjónistarnar. Nýggja freistin var ikki galdandi fyri eldri fólk.

Og so stóðu vit aftur har við skegginum í postkassanum.

Nú vóru pensjónistarnir ikki gloymdir. Nei, so langt í frá. Frá hægsta politiska myndugleika

vóru boðini, at man roknaði við, at pensjónistar, sum duttu úr hjálparpakkaskipanini 30. juni, høvdu fingið størv síni aftur so hvørt, sum korona-summarið 2020 leið.

Og tí skuldu teir ikki framhaldandi hava fíggjarligan koronustuðul.

Hetta rakti 62 pensjónistar, sum framvegis 30. juni vóru við hús, meint. At lata hesar sloppið at hildið fram í hjálparpakka 2 hevði ikki koppað nakrari almennari fíggjarligari hjálp.

Rætt var borið at, tá tiltøk vóru sett í verk at verja okkara gomlu, veiku og sjúku móti hervi-ligu smittuni.

Men rætt var ikki borið at, tá munur vegna aldur var gjørdur á arbeiðssomum pensjónstum, tá fíggjarligi hjálparpakki 2 var longdur við tveimum mánaðum.

Tað hevði nú sømt myndugleikunum væl at vent sær til Landsfelag Pensjónista í sambandi við fíggjarligu koronahjálparpakkarnar, men tað gjørdu teir ikki, hóast landsfelagið hevur gjørt vart við trupulleikan.

Enn hevur Korona fastatøkur á okkum, og enn herjar hendan óhugnaliga Covid-19 pandemi eirindarleys um allan heimin.

Tað ræður um hjá landsins myndugleikum at hjálpa øllum og ikki bara lata sum luft og senda pensjónistar út í fíggjarligan kulda vegna aldur.






*Hans Samuelsen, 84 ár*

# KASPARLIÐIÐ LIVIR Í BESTA VELGÅENDE

**Einaferð um mánaðin hittast nakrir pensjónistar í Havn til ein óformellan kaffimunn á Hotel Hafnia.**

***Tekstur: Beate L. Samuelsen***
***Myndir: Kári við Rættará***

At tað hevur týdning hjá pensjónistum javnan at hittast, er eingin ivi um. Tað vísir stóra uppmøtingin, ið flestu pensjónistafeløg kring oyggjarnar siga frá, tá boðað verður til limafund.

Hóast tú ert limur í einum pensjónistafelag, er ikki vist, at tú tímir at møta upp hvørja ferð, limafundur er. Men mongum dáma væl ta sosialu samveruna til javnan at hittast, og tá eru limafundirnir sera hentir. Hetta at koma saman at práta um mangt og hvat, gamalt og nýtt, og taka fram evnir, ið eru á dagsskrá samfelagsins.

Ein teirra, sum í mong ár trúliga hevur møtt hvørt mikukvøld, tá Pensionistafelagið í Havn hevur limafund, er 84 ára gamli Hans Samuelsen, ið eisini eitt skifti var nevndarlimur og kassameistari felagsins.

Hann møtir upp hvørt limakvøld, um ikki annað kemur í vegin.

## Teldan kollapsaði

Stigtakarar til ein pensjónistakaffifund einaferð um mánaðin á Hotel Hafnia vóru millum onnur Eiko Apol, Karin Jacobsen og Sverri Petersen. Aftrat teimum vóru hjúnini Nancy og Thorolf Bjørklund, Masa og Hans Samuelsen og Nena Danielsen, bara fyri at nevna nøkur.
Hetta var einaferð fyrst í 00'unum.

Tann einasti av teimum, sum enn er á lívi og framvegis virkin í kaffiklubbanum, nevndur Kasparliðið, er Hans Samuelsen.
Og so er tað Karin Jacobsen, sum fyri nógvum árum síðani flutti til Danmarkar.

Hans hevur líka frá fyrsta degi ført eitt slag av Kasparliðs dagbók. Har hevur hann skrivað upp dato, mánað, ár, hvør og hvussu nógv møttu upp til kaffimunnin hvørja ferð.

*Tað gongur lívliga fyri seg, tá pensjónistarnir sita og práta tvørturum borðini inni á Kafé Kaspar. Tá nógv møta upp, kann tað verða í so trupult at hoyra, hvat tey, sum við annan borðendan siga við tey, sum sita við hin borðendan.*



– Men so kollapsaði teldan hjá mær, og allar informatiónirnar á henni hvurvu sum døgg fyri sól, sigur Hans, sum bleiv einkjumaður fyri nógvum árum síðani.

## Venjingin bleiv av ongum

Tórshavnar Býráð keypti fyri nøkrum árum síðani gomlu Marinustøðina við Hoyvíkstjørn. Bygningurin skuldi brúkast og innrættast til røktar- og pleyguheim. Til endamálið kravdist ein stór umbygging.
Í 2008 var komið so mikið langt, at fyrstu



búfólkini fluttu inn eins og nøkur, sum vóru til umlætting.

Í sambandi við umbyggingina varð m.a. innrætt-að eitt venjingarhøli við venjingartólum og -útgerð, ætlað ikki bara búfólkunum, men eisini eldri fólki í kommununi.

Pensjónistarnir fingu eftir avtalu við borgar-stjóran loyvi til at brúka venjingarhølið á Tjarnargarði ein tíma um vikuna.

Men so við og við gjørdist í so trongligt, tá pensjónstarnir komu á Tjarnargarð til venjingar, at rúm ikki var fyri teimum har longur.

***Nakrar ferðirnar hava eg og unnustan, Selma Gaard, óttast fyri, at kaffitiltakið fór at detta niðurfyri, eftir sum tað bara vóru hon og eg, sum møttu upp, sigur Hans Samuelsen.***



– Hetta vóru vit sera hørm um, sigur Hans Samuelsen.

Í sambandi við hetta nevnir hann, at Nena Danielsen, sála, var ein fínur yrkjari. Hon yrkti nógv, eisini persónligar yrkingar til fólk, sum hon meinti høvdu uppiborið nøkur rósandi orð uppá rím.

## Ein prikandi yrking

– Tann fyrsta yrkingin, sum hon skrivaði í samband við okkum sum pensjónistar var ein til Tjarnargarð, eftir at pláss ikki longur var fyri okkum har, leggur Hans smílandi aftrat.

– Eg helt,vit skuldu ramma yrkingina inn og heingja hana upp á Tjarnargarði. Men nei, tað vildi Nena ikki, tí hon helt yrkingina vera í so speiska.

Hans kom síðani við uppskotinum um ikki annað at senda yrkingina til borgarstjóran í Tórshavnar kommunu. Tað var jú hann, sum hevði lovað pensjónistunum at brúka venjingarhølið á Tjarnargarði. Nei, tað vildi Nena, sum var eitt so einastandandi fitt og gott fólk, heldur ikki.

– Eg slapp tó at skriva yrkingina av, sigur hann.

– Men eg veit ikki, hvar hon er í dag. Møguliga hvarv hon eisini, tá teldan hjá mær gjørdist kaputt.

## Hugnaligt kaffiprát

Hóast venjingin á Tjarnargarði fór í ommu sína, hildu pensjónistarnir fram við at hittast einaferð um mánaðin á Hotel Hafnia.

Mitt í øllum fór hotellið undir at byggja um á niðastu hædd. Hetta arbeiðið bleiv bara ikki liðugt.

– Meðan hotell-umbyggingin fór fram, hitti eg ein dagin pedellin, Marni Ørvarodd á Hotel Hafnia, og fregnaðist, nær Kafé Kaspar mundi

fara at verða liðugt. Nei, tað visti hann ikki, tí arbeiðið dróg meiri og meiri út alla tíðina, greiðir Hans frá.

– Men hann kundi ið hvussu er fortelja mær, at einaferð um mánaðin hittust nøkur gomul fólk á hotellinum til ein drekkamunn, og at tað var so stuttligt at hoyra tey práta, fortelja søgur og vittigheitir og hugna sær, meðan tey vóru har.
Hans skilti á Marna, at starvsfólkini á hotellinum nærmast gleddu seg til at fáa hesi gomlu inn á gólvið hvønn mánað.

– Takk fyri hasi orðini, segði Hans.

– Eg eri ein av hesum gomlu, sum plagi at koma her.

– Ha? Tú sært ikki so gamal út, segði Marni Ørvarodd og fekk tað illa til at passa.

– Tað var týðiligt, at hann og starvsfelagar hansara gleddu seg til at síggja okkum pensjónistar.

– Og tað eru tey vist framvegis, haldi eg, sigur Hans.

## Arm í arm við MC Restorff

Víðari fortelur Hans Samuelsen, at hann ein dagin mátti parkera bilin hjá sær eitt sindur longri niðri á Áarvegnum, enn hann plagdi, tí øll parkeringsplássini beint uttanfyri Hotel Hafnia vóru upptikin.



***Elsti limur í upprunaliga Kasparliðnum er Hans Samuelsen.***

– So eg kom inn á hotellið eina góða løtu langt aftaná, at eg hevði sett Selmu av beint við høvuðsdyrnar. Hon var ikki so væl gongd. Selma Gaard er unnustan hjá Hans.

– Sjálvur fór eg inn gjøgnum ovaru dyrnar. Løgið, hugsaði eg. Fann onga Selmu. Hvar hundan er hon blivin av?

– So peikaði onkur inn í eitt annað høli. Og har koma tvey spakuliga spákandi arm í arm inn eftir gólvinum. Tað vóru Selma og MC Restorff, ið var annar av hotellstjórunum tá. MC var so galantur at fylgja henni uppá pláss, eftir sum eg ikki var har í nánd.

## Mundi dottið niðurfyri

Framvegis tann dag í dag er lív í Kasparliðnum,

sum hittist alt árið hvønn fyrsta mánadag á Kafé Kaspar til ein óformellan kaffimunn og lagkøku. Eisini summarmánaðirnar eru kaffifundir.

Her er eingin limaskapur, einki limagjald, eingin formaður, eingin kassameistari og eingin skrivari.

Ógvuliga ymist er, hvussu uppmøtingin er.

Eina tíð sá tað út til, at Kasparliðnum ikki longur var lív lagað, tí so fá møttu.

– Onkuntíð vóru vit bara tvey, nevniliga Selma og eg, sigur Hans Samuelsen.

## Meiri gongd í

Tað var einki serliga hugaligt, at bara tveir pensjónistar á Kasparliðnum sótu og hugdu uppá hvønn annan í ein tíma. So kundi man líka so væl bara sita heima. Nú er tíbetur meiri gongd aftur komin á liðið.

– Við hvørt eru vit antin trý, fimm, tíggju ella fimtan ella hvussu nógv vit nú einaferð eru tilsamans, ið seta okkum saman at hugna okkum ein góðan tíma. Ella sum tann eina dagin í summar, tá vit vóru meiri enn tjúgu. Vit vita ongantíð, hvussu nógv fólk koma, men kennast øll.

– Nú eri eg hildin uppat at skriva upp, hvør møtir og hvussu nógv vit eru, sigur Hans Samuelsen, sum ikki longur tímir at halda stýr uppá hesi viðurskifti, eftir sum teldan gekk fyri.

Og leggur aftrat:
– Tað kann eisini gera tað sama.

Upplýsast kann, at teir pensjónistar, sum møta upp til kaffihugnan hjá Kasparliðnum, gjalda sjálvi fyri seg. Limir í Pensjónistafelagnum í Havn ella í øðrum pensjónistafelag, eru automatiskt limir í Landsfelag Pensjónista og fáa umvegis limaskapin eitt blátt limakort, sum gevur 15%. avsláttur á Kafé Kaspar á Áarvegnum í Havn.



***Viðhvørt møta heilt fitt av pensjónistum til kaffi og lagkøku á Kafé Kaspar.***

# KANÓNIRNAR Á NESI



*Tekstur: Alfred Olsen*
*Myndir: Savnsmyndir*



## Herðsetingarboðini

Hin 11. apríl 1940 boðar Winston Churdhill frá, at Føroyar verða hertiknar av bretum og *"Operation Valentine"* gerst veruleiki, og longu hin 12. apríl koma 2 destroyarar á Havnina og hin 14. apríl koma teir fyrstu *Royal Marines* inn á Toftir, sum ein beinleiðis fylgja av *"Operation Valentine"*.

Tá Royal Marines fóru úr flotahavnini Rosyth við Leithfjørðin hin 12. apríl 1940, við kós móti Føroyum, vóru boðini til Sandall oberst, at hann skuldi taka tey stig, sum hann helt vera neyðug til at forða fyri, at týskurin kundi hertaka Kongs Havn á Skálafjørðinum ella lendi har um vegir.

## Verjan av Skálafjørðinum

Fyri at verja Skálafjørðin móti fíggindum undir seinna heimsbardaga, vóru longu á sumri í 1940 tvær stórar 5,5 inch kanónir settar upp á Nesi, og kavbátagørn løgd út millum Strendur og Saltnes, umframt at aðrar minni kanónir vóru settar upp á Bergi á Strondum, og luft-skýts-kanónir av ymiskum slag settar upp á Gjaranesi, á Skála og í Søldarfirði.

## Kanónirnar á Nesi

Tær 2 stóru kanónirnar á Nesi, vóru framleiddar á Coventry Ordnance Works í Onglandi og eru merktar:
C O W 5,5 inch P Mark I reg. nr. 36 framleidd í 1916 og
C O W 5,5 inch P Mark I reg. nr. 65 framleidd í 1918.
Hesar kanónirnar vigaðu 7,076 tons hvør og vóru 7,232 metrar til longdar, tær kundu skjóta upp til 12 granatir, sum vigaðu 82 pund um minuttin, við einum skjótleika uppá 2.790 fót

pr. sek. og kundu raka mál sum vóru 16,920 km. burturi t.v.s frá Nesi og inn í Skálabotn. Kanónirnar komu úr Onglandi við dampara, og tað var "Silva", sum kom á Toftakaj við kanónunum, sum síðani skuldu fraktast út á Nes og setast á fundamentið niðri í bønum á Torkildsheyggi/Flatabø.

Vegurin tá var smalur og bilar vóru ongir, so mátin, sum kanónirnar komu út á Nesi uppá, var, at teir løgdu tjúkkar træbjálkar niður á vegin, omaná hesar høvdu teir 6 rundar træstokkar, sum teir løgdu sum fundament hjá kanónini, við sverum trossum festum í, niður á, og so byrjaði flutningurin við, at marinararnir tóku í togendarnar og settu á, tá hesin ordrin kom frá offiserinum - One, Two, Tree, six, all together, hiv.

Henda mannagongdin var endurtikin fyri hvønn góðan metur, tí tann aftasti træstokkurin var komin afturum kanónina og var tí fluttur framum.Tá træstokkarnir høvdu slept tí aftara træbjálkanum, var hesin tikin upp og lagdur framum, og soleiðis var kanónin drigin út á Nesi.





So leingi tað var mótbrekka, vóru sverir træbremsiklossar lagdir aftanfyri teir rundu træstokkarnar, men tá teir vóru komnir út á Nes, og tað gjørdist undanbrekka, fluttu marinararnir afturum kanónina, og trossarnir vóru nú brúktir sum eftirsjórar og træklossarnir lagdir frammanfyri, fyri ikki at missa kanónina.

Komnir oman á Stykkir, máttu kanónirnar vendast, og tá vegurin var ov smalur til at venda kanónunum á, varð eitt vendipláss gjørt niðan í lendið, so kanónirnar kundu vendast. Tær høvdu so beina kós móti fundamentinum niðri/norðanfyri í bønum, har tær




blivu settar upp við taljum og aðrari útgerð, sum vóru brúkt tá.

Kanónirnar á Nesi blivu fleiri ferðir brúktar undir krígnum, har tær skutu ávaringarskot móti skipum, sum ikki høvdu fingið loyvi at sigla inn á Skálafjørðin. Men ongantíð var skotið fyri at søkkja nakað skip. Harumframt høvdu teir skotvenjingar við kanónini, har skotið var móti málum omanfyri Sund/Kaldbak, ella móti seglinum á prámi, sum skip komu sleipandi við undan Eystnesi ella Nólsoynni, men tað kom fyri, at skotið var ov lágt, so prámurin var raktur og fór í luftina.

20. juni 1940 var ein dramatiskur dagur, tá 4 destroyarar HSWMS "Psilander", "Remus", "Puke" og "Romulus" hjá svensku marinuni blivu tiknir av bretum og førdir inn á Skálafjørðin, har øll tilbúgvingin var klár og bretskir destroyarar sigldu við fullari kraft inn og út eftir fjørðinum, tí hesir destroyararnir vóru keyptir úr Italien, sum undir leiðslu av Mussolini var farið í part við Týskland og tí vóru at rokna sum fíggindar. Hesir destroyarar blivu síðani "eskorteraðir" til Onglands, meðan diplomatiið fekk greitt fløkjuna, so friður framhaldandi kundi valda millum Ongland og Svøríki.

## Eitt avmarkað yvirlit yvir hetta slagið av kanónum

Hesar kanónir vóru væl umtóktar og tí nógvar




umbidnar fyrst í 1900 talinum, og blivu sum oftast monteraðar í stýriborðs- og bagborðs-síðu á størri krígsskipum, sum til dømis HMS "Chester", bygdur í 1916.

"Chester" hevði 10 slíkar kánónir, HMS "Birkenhead" frá 1915 hevði 10 slíkar kanónir, HMS "Furius" frá 1917 hevði 11 kanónir av hesum slagnum, HMS "Hood" frá 1920 hevði 12 av hesum kanónunum, HMS "Hermes" av 1924 hevði 6 slíkar kanónir.

Av hesum serstaka slagi av 5,5 inch kanónum, blivu bara 82 kanónir framleiddar, og í dag finnast bara 6 slíkar kanónir í heiminum, og tær eru: 2 á Ascension Islands reg. nr. 56 og 78 og stava frá HMS "Hood". Ein kanón og tann best varðveitta er á Imperial Waar Museum í London, tvær finnast á Skansanum í Havn reg. nr. 35 og 42 og vera sagdar at vera av HMS "Furius", sum var flotaður í 1917 og umbygdur í 1939, tá hesar kanónirnar blivu útskiftar og koyrdar í land.Tann seinasta er á Nesi og hevur reg. nr. 65, framleidd í 1918.

Eg síggi í greinum, at sagt verður, at kanónirnar á Nesi høvdu reg. nr. 34 og 36, og skulu stava frá HMS "Furius". Men hetta er bara partvíst rætt, tí kanónirnar á Nesi høvdu reg. nr. 36, framleidd í 1916, og hin reg. nr. 65 framleidd í 1918, og tí neyvan stavar frá HMS"Furius", tí tað er neyvan sannlíkt, at hon var monterað



enska heiðursprógvinum "Victoria Kross" fyri sítt úthaldni og mót.

## Skálafjørðurin sum krígshavn

Høvuðsverjan av Skálafjørðinum vóru kanónirnar á Nesi, saman við skansanum á Bergi á Strondum, sum saman við undirvatnsbátagørnum og luftskýtskanónum á Gjaranesi, Skála og Søldarfirði, vardu øll skip so væl, at onki skip var søkt á Fjørðinum, sjálvt um einar 70 bumbur vóru sleptar niður á Skálafjørðinum undir krígnum. Vit vita um ein mann, sum var "the Gunner" skjútti umborð á einum tangabáti, sum lá út fyri Søldarfirði, og sum lív í einum týskum flogálopi. (Hesum álopi hevur Sofus Poulsen eina áhugaverda frásøgn um).

umborð á "Furius", sum var flotaður í 1917, t.v.s árið fyri, at hon var framleidd. Eitt annað kvalifiserað páhald er, at hon stavar frá HMS "Hood", sum var flotaður í 1920 og reg. nr. 65 liggur millum tær á Ascension Ísland, sum eru frá "Hood".Eg vildi fegin fingið staðfest, av hvørjum skipi, kanónin á Nesi stavar frá, tí tað hevur ikki eydnast mær at funnið fram til enn. Tað vil siga, at av teimum 6 kanónunum av slagnum 5,5 inch sum finnast í heiminum í dag, eru tær 3 (helmingurin) í Føroyum, og tað haldi eg er áhugavert.

Eitt roysnisbragd undir fyrra heimsbardaga, varð framt umborð á HMS "Chester", sum luttók í "slagnum við Jylland" hin 31. mai 1916, av einum 16 ára gomlum drongi, sum kallaðist Jack Cornweel, hvørs kampdisposition var við eina av hesum 5,5 inch kanónum. Sjálvt um fleiri av starvsfeløgnum vóru dripnir, og hann sjálvur var álvarsliga særdur, helt hann á við at skjóta við kanónini. Fyri hetta bragdið bleiv hann aftaná heimsbardagan heiðraður við hægsta

## Verjuskansin úti á Nesi

Tá bretsku hermennirnir komu til Toftir, fingu teir innivist í missiónshúsinum, Oyrahandlinum og ymiskum privathúsum, meðan barakkir og aðrir bygningar vóru gjørdir, tó vóru tað nøkur privathús, sum bretar høvdu øll krígsárini.

Úti á Nesi blivu bygdir 2 kanónbunkarar, 3 tilhoyrandi lóðurgoymslur, 2 stórir ljóskastarar, 1 betongbarakk til 2 ljósmotorar og 1 betongbunkari til 1 ljósmotor, 2 Bi&PI og 1 brúsubarak, sum eru til í dag, meðan 11 sovibarakkir (rúmaðu 16 soldátum hvør) 1 Naafi, 1 skaffibarakk, 1 matvørugoymslubarakk, 4 luftskýtskanónir, 2 El-luftskýtskanónir, umframt vaskibarakk, skrivstovubarakk, bilhús, kokkhús, wcbrumma

og aðrir bygningar eru burtur. Tað blivu 42 bygningsverk bygd úti á Nesi og stoyptir góðir 500 metrar av gøtum, meðan bretar brúktu 2 sethús úti á Nesi, sum var mannaður fyri tað mesta av eingilsmonnum.

Á Toftum var hospitalsfunktiónin. Hendan fevndi um 1 hospitalsbarakk, 1 seingjardeilds-barakk, 1 kokkhús, 1 brúsibaðsbarakk, 1 damp-rúm, 1 heittvatnstangi, 1 vørugoymslubarakk, 1 nátthús. Vatnið til hospitalsfunktiónirnar varð fingið frá Heimara Hamravatni, leitt oman í eitt baseng (Eingilskabasengi í 4 rúmum) omanfyri garðarnar, í alt 9 bygningar. Tað vóru 3 læknar knýttir til hospitalið, sum allir búðu í privathúsum. Yvirlæknin búði í húsinum hjá Oluf Færø, meðan hjálparlæknarnir búðu hjá Karolinu Mikkelsen.

Ein góð søga er frá Canada, tá ein maður úr Kollafirði, sum sigldi úti, varð innlagdur á sjúkrahús í Canada, nógv ár aftaná kríggið. Læknin kemur inn og spyr hann m.a. hvar hann er frá. Og tá hann sigur, at hann er úr Føroyum, spyr læknin hann: "Kennir tú Karolinu Mikkel-sen"? og hesin svarar: "Ja, hon er fastur mín", læknin sigur,:"Hon er heimsins besta menn-iskja". Tá var hetta annar av hjálparlæknunum á Toftum, og teir fingu eitt gott prát, meðan læknin roykti eina cigar á songarstokkinum.

Á Toftum inni á Regni og Brekkum, var ein hernaðarbasi, sum innihelt 6 sovibarakkir, 1 skaffibarakk, 2 goymslubarakkir (matur og lóður) 1. Naafibarakk, 4 luftskútskanónir, kokkhús, El-verk, vask-, brúsi- og wc barakkir, garaga, kolagarður og vaktarrúm, í alt 22





bygningar, umframt 2 sethús, sum offiserar ótu og búðu í.

Tað vóru hermenn av støðini inni á Regni, sum tóku ímóti týskarunum, sum vóru í flogfarinum, sum varð skotið niður og lendi á Gøtuvík. Teir vóru fluttir út á Toftir, har teir fingu innivist til morgunin eftir, tá teir vórðu førdir til Havnar. Av hermonnunum, sum vóru Royal Marines, Lovat Scouts og Cameronians (Scottish Rifles), vóru tað mest eingilsmenn sum vóru station-eraðir úti á Nesi, meðan skotar vóru inni á Toftum.

Talið á hermonnum á Nesi og Toftum undir krígnum vóru í miðal uml. 300 mans, og tá teir vóru mest á Skálafjørðinum, serliga í Søldar-firði, vóru tað uml. 1600 mans. So krígstíðin setti sín dám á tilveruna á Skálafjørðinum, sum var flotaherstøðin hjá bretum í Norðuratlanti-num.

## Endurreist kanónina

Fyri góðum ári síðani fór eg undir at endurreisa økið rundanum kanónina úti á Nesi, tí ætlanin var, at hon skuldi vera ein partur av 75 ára minningarhaldinum, sum ætlanin var at halda, nú 75 ár eru liðin, síðani heimsbardagin endaði. Tað eydnaðist, so umhvørvið sær út í dag, sum tað var undir krígnum, meðan sjálv kanónin enn stendur "ber" og manglar tær funktiónirnar, sum vóru monteraðar "uppá kanónina".

Eg vóni, at vit kunnu endurskapa hesar funktiónir, so kanónin C.O.W Reg. nr. 65, kann koma at standa í sínum "majesteti" úti á Nesi í framtíðini, sum prógv uppá verjuna av Skálafjørðinum undir seinna heimsbardaga, og liður í at varðveita søguna undir krígnum frá 1940 til 1945.

# ÁRSVEITSLAN 2019 HJÁ LANDSFELAG PENSJÓNISTA



*Ingeborg og Alfred tóku sær av lutaseðlasøluni*



***Tekstur & myndir: Gunnleyg Durhuus***

Sum á hvørjum ári skipaði Landsfelag Pensjónista fyri ársveitslu fyri limir í eldra- og pensjónistafeløgunum í Føroyum.

Ársveitslan var leygardagin 26. okt. 2019, og fyri fyrstu ferð var veitslan í Sjónleikarhúsinum í Tórshavn. Hetta dámdu nógvum sera væl, tí nógvir av gestunum hava í sínum ungu døgum javnan verið í dansi í Sjónleikarhúsinum, eisini til sjónleik og onnur tiltøk.

At hittast í hesum hugnaligu hølunum fekk nógv góð minnir fram frá teirra ungdómi, og setti hetta ein serligan dám á veitsluna. Tað vóru umleið 140 fólk og hýrurin var góður. Tað var týðuligt, at fólk fegnaðust um at hitta vinir og kenningar, har fleiri ikki høvdu sæð hvønn annan í fleiri ár.

## Ingeborg og Alfred syrgdu fyri lutaseðlasøluni

Byrjað varð við vælkomstdrinki og við lutaseðlasølu. Søla av lutaseðlum er altíð ein partur av ársveitsluni, har eldra- og pensjónistafeløgini og onnur geva góðar vinningar.



*Eitt hugnaligt borðhald í Sjónleikarhúsinum*



*Borðreitt var við lambakjøti frá Hotel Hafnia*



*Ólavur, Holgar og Niels syngja og spæla undir borðhaldinum*



*Tað var næstan soleiðis, at fólk kappaðust um at reisa seg upp undir borðhaldinum. Tey vildu siga frá teirra upplivingum í Sjónleikarhúsinum, tá tey vóru ung. Ein teirra var Poul Havn.*



*Jórun Poulsen sigur frá stuttligum upplivingum*



*Elna Lamhauge Strøm sigur nøkur orð*



*Mortan Johannesen hevði nógvar søgur at fortelja*



*Dansurin gekk sera væl*

Høvuðsvinningar í ár vóru: Gávukort frá Flog.fo við vikuskiftisferð fyri tvey til París ella annað ferðamál, virði 6.000 kr. og eitt gávukort á 2000 kr. frá Atlantic Airways.

## Eitt hugnaligt borðhald í Sjónleikarhúsinum

Beate L. Samuelsen, forkvinna í Landsfelag Pensjónista, beyð vælkomin og bjóðaði fólki til borðs, har borðreitt var við lambakjøti frá Hotel Hafnia.

Kári P. Højgaard, fyrrv. løgtingslimur, helt røðu undir borðhaldinum, og fleiri enn vanligt ynsktu at siga nøkur orð.

## Ólavur, Holgar og Niels syngja og spæla undir borðhaldinum

Vestmenn Trio við Ólavur Højgaard, Niels Olsen og Holgar Jacobsen spældu undir borðhaldinum, so sangurin gekk sera lætt, og síðan spældu teir til dans.

Eftir borðhaldið var farið upp á gólv, og síðan var tað sera stuttligt at sleppa at dansa í Sjónleikarhúsinum til tann góða sangin frá Ólavi og dansitónleikin frá Niels og Holgar.

## Dansurin gekk sera væl

Har var sving í fólki, so tað var ein fragd at síggja, hvussu fólk hugnaðu sær.

Fólk gingu frá borð til borð at práta og hitta fólk.

Eitt væleydnað tiltak og nevndin takkar fegin øllum, ið stuðlaðu og luttóku í veitsluni.

# ARBEIÐSSAMI PENSJÓNISTURIN

# Olaf Haldansen

*Tekstur: Karmal Olsen*

*Myndir: Gunnleyg Durhuus*



## Verður 90 ár í desember og framvegis virkin

Hóast skjótt 90 ár, so arbeiðir Olaf Haldansen enn 8 til 10 tímar hvønn dag uttan sunnudag á sínum timbur- og snikkaravirki.

Olaf Haldansen, timbur- og snikkarameistari í Vestmanna, vanliga nevndur Olaf hjá Ginnu, og verður 90 ár 20. des. í ár. Hóast høga aldurin er hann væl fyri og er framvegis virkin á sínum timbur- og snikkaravirki í Vestmanna, har hann trívist sera væl.

## Uppvøkstur

Olaf er føddur í Vestmanna 20. des. 1930. Uppvaksin í Vestmanna, uppi í Skálum.
Pápi Olaf, Joen Thomasius Martin Sofus Haldansen var føddur og vaks upp í Vestmanna Uppi í Gørðum. Hann var sjómaður alt sítt lív. Doyði 72 ára gamal í 1970. Mamman, Jørgine Sofie Oline Johanne Haldansen, vanliga nevnd Ginna, er ættað úr Æðuvík. Hon doyði í 1988, 84 ára gomul.

Foreldrini løgdu stóran dent á útbúgving, so Olaf og beiggin Meinhard fingu báðir útbúgving. Meinhard, ið var 14 mánaðar yngri enn Olaf, lærdi til telegrafist og elmekanikara, og hevði kendu fyritøkuna Radioservice. Meinhard doyði fyri nøkrum árum síðani.

Olaf minnist, at beiggin longu sum 14 ára gamal gjørdi sítt egna radio. Hetta var undir seinna veraldarbardaga.

Olaf plagdi at spæla við í Vestmanna Hornorkestri. Somuleiðis var hann við í kórinum hjá Ólavi Hátún, tá hann var lærari í Vestmanna.



*Olaf uttanfyri barnaheimið og núverandi heim sítt*

Hóast dansistovan í Vestmanna lá beint niðanfyri barnaheimið, var hann sjáldan í dansi, tó plagdi hann at vera í biograf hjá Geytanum og Ásmundi á Rógvu.

## Arbeiðslív

Olaf fór í snikkaralæru hjá Axel Haraldsen í Vestmanna. Axel doyði í 1949 við tí úrslitið, at Olaf ikki fekk gjørt sveinastykkið liðugt. Var tí í Danmark veturin 1952, 53 og 54 í skúla. Hann fór til Danmarkar við skipi, og Louis, sonur Axel mátti vátta, at hann hevði lært hjá pápanum.

Olaf byrjaði sína egnu fyritøku í kjallaranum hjá foreldrunum í 1956 og gjørdi køkar, trappur o.a. snikkaraarbeiði. At hjálpa sær hevði hann Viggo í Skálum, Gunnar hjá Sannu og Bendix Bærentsen.

Í 1968 bygdi Olaf nýtt verkstað úti á Bakka, men í 1989 kom eldur í verkstaðin, og húsini brendu í grund.



***Verkstaðurin hjá Olaf***

Olaf endurreisti Verkstaðið úti á Bakka í 2009.

Eftir eldsbrunan úti á Bakka bygdi Olaf stórt snikkaravirki inni á Fjørð.

Fyrst í 70unum fóru Jákup og Símun hjá Axali saman við Janusi Petersen, verkfrøðingi úr Kvívik, undir at byggja sniðhús (typuhús), ið kallaðust Fjarðahús.



***Olaf fylgir við hvat hendir á vánni***

Heitt var í tí sambandi á Olaf, um at standa fyri at gera trappur, hurðar, og hvølpalás til hjallarnar á Fjarðahúsunum. Olaf sigur, at hann hevur gjørt útgerð til uml. 400 av hesum húsum.

Eisini hevur Olaf tilevnað vevar. Hann minnist serstakliga vevin, hann gjørdi til Hervør Durhuus, konu Jógvan á Posthúsinum.

Arbeiðið í dag er mest ábøtur, onkrar trappur og annað serarbeiði.

Fólk koma ofta inn á verkstaðið at vitja, og handverkverkarar koma ofta inn at lána útgerð á vælútgjørda verkstaðnum.

Olaf arbeiðir uml. 10 tímar 6 dagar um vikuna, tí her trívist hann best.

Tá hann hvílir seg, situr hann í einum hjørni inni í verkstaðnum og lurtar eftir radio ella hann fer útum á altanina og hyggur eftir, hvat hendir á vánni.

## Kappróðrarbátar

Tá Olaf var farin um pensjónsaldur, heitti Vestmanna Ítróttarfelag á hann, um at byggja eitt tíggjumannafar til felagið. Báturin kallast Vestmenningur.

Báturin var liðugt smíðaður ár 2000 og vann FM-róðurin sama árið og fleiri ferðir eftir hetta.



***Olaf í gongd við eitt serstakt borð til ein kunda***



***Olaf hvílir seg og lurtar eftir útvarpinum***



***Vestmenningur føroyameistarar ár 2000***

Olaf hevði royndir við kappróðri, har hann var ein av manningi á Vestmenningi í 50 og 60´unum, har teir ofta vunnu.

Í 2003 bygdi Olaf tveir bátar afturat. Havfrúnna og Fortunu, ið vóru fýra- og seksmannafør. Pauli Andreasen hjálpti til við at byggja kappróðrarbátarnar.

Allir bátarnir fingu góð úrslit, tó gekst ikki so væl hjá Fortunu. Vestmanna Ítróttarfelag tók tí avgerð um at selja Fortunu til Vágs Kapplóðrarfelag, og fekk báturin navnið Smyril. Eftir hetta kláraði báturin seg serstakliga væl. Olaf var sera glaður, tá hann varð boðin á Jóansøku í Vági, og sá har Smyril (Fortunu) vinna á heimasjógvi, og tá var blíðskapurin óførur.

Olaf ger ikki nógv burtur úr sær, er lítillátin og eitt sereyðkenni fyri Olaf er, at hann altíð er í arbeiðsklæðum, hevur pípu í munnklovanum og ein koll á høvdinum.

Nakrar hendingar minnist Olaf serstakliga væl. Tá hann var 8 ára gamal, fekk Olaf staðfest skarlaksfepur. Hann varð sendur til Havnar á sjúkrahúsið og avbyrgdur í einum sjúkrarúmi í fleiri mánaðir. Fekk onga vitjan í tíðarbilinum, og ta einu ferðina var hann gloymdur í hálvannan dag uttan at fáa hvørki vátt ella turt. Hetta var øgiligt og hevur fest seg fast í minni hansara.

Nú vit tosa um avbyrging í sambandi við Korona,  er Olaf serliga varin, og er tí ikki nógv í samband við onnur fólk. Fyri tað mesta er hann einsamallur til arbeiðis niðri á verkstaðnum.

Ein annar tilburður, ið hevur fest seg í minnið, er kreppan í 1992. Brádliga var onki arbeiði, hópfráflyting og svartskygni. Úrslitið av hesum var húsagangur. Olaf misti verkstaðið inni á Fjørð, men hann gavst ikki so, bygdi gamla verkstaðið uppaftur í 2009 úti á Bakka, har hann nú húsast.

Ein onnur hending, ið hevur fest seg í minnið, eru teir stóru eldsbrunarnir í miðbýnum í Vestmanna í 1969, tá hotellið hjá Jakku hjá Nicolinu á Barnaheiminum brendi og aftur í 1970, tá næsta hotellið hjá Jakku og verkstaðið hjá Johannes Nicolajsen, vanliga nevndur Koffa, brendu. Hesar hendingar skelkaði íbúgvarnar í Vestmanna, serstakliga børnini.

Hvat matgerð og mat viðvíkur, so dámar Olaf best vanligan føroyskan mat, serliga fisk og fiskaúrdráttir, annars grind og onkuntíð kjøt. Eplir afturvið og onkur gularót. Hann heldur seg til fastar mattíðir, og etur altíð døgverða á miðdegi.



***Vestmenningur 1956: Frá vinstru: Arni á Rógvu, Gudmund Olsen, Olaf haldansen, Niels Durhuus, Karl Várlið, Albin Simonsen, Agnar Nielsen, Kjartan Nielsen, Hans Nicolejsen, Jákup Andreasen, Smith Nicolajsen***

Olaf er ikki giftur, og heldur skemtiliga fyri, at tað er kanska ein av orsøkunum til, at hann er so væl fyri enn og kann arbeiða hvønn dag. Gift teg og gift teg ikki, tú angrar bæði til tíðir. Mann kan kanska siga, at Olaf er giftur við arbeiðinum.

Olaf er tiltikin fyri at hava gott eygamát, og tað kemur meira enn so fyri, at tá hann skal gera eitt arbeiði, tað veri seg viðlíkahald ella nýgerð, so kemur hann á staðið, hyggur seg um, og tá hann kemur við liðnu vøruni, so passa øll mát. Tað mesta av arbeiðinum, Olaf tekst við, er uttanfyri standardmát. Hann er nógv eftir-spurdur, og tí er til tíðir nakað av bíðitíð, áðrenn umbidna arbeiðið er liðugt. Fólk sum heild eru samd um, at Olaf er verdur at bíða eftir, tí hann er so vælgjørdur.

## Lívið sum pensjónistur

Tá prátið fellur inn á arbeiðið og aldur, heldur Olaf, at 67 ár ikki eigur at verða ein avgerðandi faktor. Tekur seg sjálvan sum dømi. Tó heldur hann, at arbeiðsorkan fellur eitt sindur við aldurin, og fólk eru ymisk. Gleðin at kunna koma til arbeiðis og kenna seg at vera til nyttu, er ein týðandi faktorur í lívsgóðskuni hjá tí einstaka. Jú eldri tú ert, jú størri vitan liggur tú inni við, ið tú kanst deila við onnur.

Olaf sigur, at hann tíverri ikki hevur tíð at taka lut í virkseminum hjá Pensiónistafelagnum Vesturskin í Vestmanna, hóast hann veit, at tey hugna sær dúgliga.

Vit ynskja Olafi nógv góð ár frameftir og tillukku við teimum 90 árunum 20. des. 2020.

# UPPSKRIFTIR TIL BLÓÐMØR OG RULLUPYLSU

*Uppskriftir: Ingeborg Vinther*

UPPSKRIFT





## Blóðmør

Tilfar til 2 litur av blóði er til umleið tveir sveitar.

- 400 gr. rugmjøl
- 500 gr. hveitimjøl
- 300 gr. havragrýn
- 1 kg putursukur
- 2 pk. nellikar
- 65 gr. kanel
- 2 tsk. pipar
- 3 tsk. allahande
- 400 gr. dadlur smátt karvaðar
- 400 gr. rosinur
- Tálg eftir tørvi

Rør alt tilfarið saman, men blanda alt kryddarí saman, áðrenn tað verður rørt í blóðið. Tá deiggið er nóg tjúkt, skal ein tálgamoli kunna flóta omaná deigginum.

Prika indrini, áðrenn tey verða koyrd í eina grýtu við kókandi vatni. Prika síðan indrini, til ongar luftbløðrur koma úr indrunum.

Lat kóka umleið tveir tímar alt eftir, hvussu stór indrini eru. Tað er liðugt kókað, tá onki blóð kemur uppá træpinnin, prikað verður við.

## Rullupylsa við fótamøri ella síðu

Eg saltstroyi altíð síðuna ella fótamørin eina nátt, áðrenn eg geri pylsuna.

- 3 tsk. smáttkarvaðan leyk
- 2 tsk. pipar
- 2 tsk. urtagarðs kryddarí
- 2 tsk. grikst kryddarí

Blanda kryddaríini saman og legg á síðuna/fótamørin. Er síðan nakað tunn, er gott at leggja kjøtbitar inn í pylsuna. Ofta eru fótamørar av lambi so tunn.

Rulla pylsuna saman og seyma pylsuna. Eisini ber til at brúka net, ið eru gjørd til endamálið. Net fáast í matvøruhandlum.

Skal kóka spakuliga í 1-1 ½ tíma.
Leggjast í press til næsta dag.



*Frá vinstru: Haldor Gaardbo, Aloma Davidsen, Helga Gleðisheyggj, Alfred Olsen, Theodor Poulsen, Vernar Olsen*

# AÐALFUNDUR HJÁ ELDRAFELAGNUM Á TOFTUM

**Eldrafelagið á Toftum hevði aðalfund tann 11. juni 2020 á Svangaskarði.**

*Tekstur & myndir: Gunnleyg Durhuus*

Nógv fólk møttu til aðalfundin, har eisini tónleikur var á skránni. Eitt harmonikulið og guitarspælari syrgdu fyri góðum stemningini.

Alfred Olsen, formaður, legði fram ársfrágreiðing hjá felagnum, og Beate L. Samuelsen, forkvinna í Landsfelag Pensjónista, greiddi frá arbeiðinum hjá Landsfelagnum.

Nógv fólk var møtt á aðalfundinum. Aftaná aðalfundin varð borðreitt við góðum mati við føroyskum viðskera og køkum.

**Nevndin í Eldrafelagnum á Toftum hevur skipað seg soleiðis:**
Alfred Olsen, formaður og skrivari,
Haldor Gaardbo, næstformaður,
Aloma Davidsen, kassameistari,
Theodor Poulsen, nevndarlimur,
Helga Gleðisheyggj, nevndarlimur.

Varalimir: Vernar Olsen og Haldur Vang.



*Frá vinstru: Ólavur Jensen, Ragnar Nesstein, Krisolvur Johannesen, Janus Jensen, Mortan Højgaard, og fremstur Sakaris Hansen (Saggi).*



*Frá vinstru: Anna Maria Pettersen, Gurli Svartá, Hanus Petersen, Marita Joensen, Asbjørn Djurhuus, Elsebeth Maria Johannesen, Vibeke Ingvarsson, Ása Eikholm*

# SUNDA PENSJÓNISTAFELAG HAVT AÐALFUND

**Sunda Pensjónistafelag hevði aðalfund tann 10. febr. 2020 í Blákollini á Oyri .**

*Tekstur & myndir: Gunnleyg Durhuus*

Sunda Pensjónistafelag hevur ikki verið so virkið tað seinasta árið, men nú er gongd komin í aftur. Væl av fólki møtti til aðalfundin 10. februar, og fundarfólkið var sera áhuga í at fáa felagið í gongd aftur.

Beate L. Samuelsen, forkvinnna í Landsfelag Pensjónista, greiddi frá arbeiðinum hjá Lands-felagnum, har hon m.a. umrøddi nýggju pensjónslógina.

Aftaná nevndarvalið fingu fundarfólkini kaffi og góðar køkur.

Aðalfundurin var áðrenn Covid-19 fór runt verðina, so felagið hevur ikki verið so virkið, sum ætlað annars var í vár, men nú er gongd komin í aftur. Sunda Pensjónistafelag hittist hvønn fyrsta mánadag í mánaðinum í Blákollini á Oyri.

Nevndin í Sunda Pensjónistafelag hevur skipað seg soleiðis:
Vibeke Ingvarsson, forkvinna,
Gurli Svartá, næstforkvinna,
Elsebeth Maria Johannesen,
nevndarlimur og skrivari,
Anna Maria Pettersen,
nevndarlimur og kassameistari,
Marita Joensen, nevndarlimur,
Hanus Petersen, nevndarlimur.

Varalimir: Ása Eikholm og Asbjørn Djurhuus.

# ÁRSFRÁGREIÐING 2019-20
# LANDSFELAG PENSJÓNISTA

*Tekstur: Beate L. Samuelsen*

*Mynd: Kári við Rættará*

**Mismunur og javnviðgerð á arbeiðsmarknaðinum**

Eitt av tí fyrsta, LP gjørdi eftir seinasta aðalfund í fjør, var at heita á politiska myndugleikan um at kalla løgtingið saman. Løgtingið var nevniliga farið í so tíðliga í summarfrí. Harvið duttu fleiri løgtingsuppskot, sum framvegis lógu í nevnd, burtur. Tá hetta hendir, mugu uppskotini leggjast fram av nýggjum, tá nýggj tingseta verður sett á ólavsøku.

Fyri okkara viðkomandi snúði tað seg um løgtingsuppskotið um at banna mismuni og tryggja javnviðgerð á arbeiðsmarknaðinum fyri m.a. pensjónistar, sum datt burtur.

Í uppskotinum stóð at (citat) "tað ber til at gera mismun vegna aldur t.d., tá ið persónur hevur rokkið pensjónsaldur".

LP metti longu beinanvegin, tá uppskotið var sent til hoyringar í Rættarnevndini, at uppskotið gekk beint ímóti upprunaliga endamálinum við lógaruppskotinum, at **banna mismuni og tryggja** javnviðgerð á arbeiðsmarknaðinum.



*Beate L. Samuelsen, forkvinna í Landsfelag Pensjónista*

Nógvir pensjónistar eru væl fyri og ynskja at verða verandi á arbeiðsmarknaðinum. Tað er tí stór íløga hjá einum landi, at fólk eru til arbeiðis, og eigur tað tí ikki at verða aldurin, men **arbeiðsførleikin**, ið avger, um ein skal av arbeiðsmarknaðinum.

Vit vilja hava, at fráfaringaraldurin skal burtur, og at tað ikki er loyvi at siga fólki upp vegna

aldur. Pensjónsaldur skal ikki vera tað sama sum fráfaringaraldur á arbeiðsmarknaðinum. Við hesum heitti Landsfelag Pensjónista á løgtingið at lóggeva, at tað ikki var loyvt at siga fólki upp vegna aldur og at allur mismunur vegna aldur á arbeiðsmarknaðinum er ólógligur.

## Eldradagurin á Drelnesi

Eldradagurin 2019 var leygardagin 24. august í Suðuroynni. Pensjónistafeløgini bæði í oynni, Høft á Tvøroyri og Pensjónstafelagið í sunnaru helvt í Suðuroynni, vóru saman við LP heppin at fáa innivist í SALT á Drelnesi, har yvir 320 fólk úr øllum landinum hittust.

Smyril var henda leygarmorgunin kl. 07 á tremur við fólkapensjónistum, tá hann fór av Havnini. Veðurlíkindini um Suðuroyarfjørð vóru sera góð.

Nøkrum ælum sluppu vit ikki undan undir túrunum báðum, sum stóðu í skránni, har annar túrurin gekk fram við Stórá og hin í Valinum. Dagurin eydnaðist avbera væl við felags morgunmatarborði, døgverða og millummála. Borgarstjórarnir Kristin Michelsen, Tvøroyri, og Dennis Holm, Vági, bóru fram heilsanir. Alt gekk strálandi bæði við undirhaldi og sangi, røðum og lutaseðlasølu sum heild. Gestarøðari henda dagin var Hans í Líðini.

## Yvirlýsing LP´s í landsstýrið

Løgtingsval var 31.aug. 2019, og sendi LP undan valinum yvirlýsingina, sum samtykt varð á formansfundi 2. apríl 2019 við ynskilista okkara, til allar flokkar og fjølmiðlar. Í yvirlýsingini løgdu vit dent á fýra høvuðsevni, sum felagið arbeiðir fram ímóti.

Tey vóru hesi:

1. **Útgjald frá Samhaldsfasta skal verða skattafrítt.**
   Samhaldsfasti verður skattaður tvær ferðir í dag - við inngjald og við útgjald. Hetta eigur at broytast somuleiðis sum aðrar pensjónir, sum í dag verða skattaðar við inngjald og eru tí skattafríar við útgjald.

2. **Hækka grundupphæddina.**
   Skattafría grundupphæddin skal hækkast við í minsta lagi 580 kr., sum hon varð lækkað við í 2016.

3. **Mótrokningarfría inntøkan skal hækkast upp til kr. 100.000.**
   Tað skal kunna løna seg hjá pensjónistum at arbeiða eftir pensjónsaldur. Í dag, altso í 2019, verður viðbótin mótroknað, tá inntøkan fer uppum kr. 61.900 fyri støk og kr. 80.000 fyri hjún, og tá er brennistuðulin eisini tikin burtur. Mælt verður eisini til, at mótrokningarprosentið í viðbótini verður lækkað frá 60% til 30%.

4. **Fráfaringaraldurin skal burtur.**
   Tað skal lóggevast, at tað ikki er loyvt at siga fólki upp vegna aldur. Pensjónsaldur skal ikki vera tað sama sum fráfaringaraldur á arbeiðsmarknaðinum. Tað skal ikki verða aldurin, men arbeiðsførleikin, ið avger, um ein skal av arbeiðsmarknaðinum ella ikki.

Stutt eftir at samgongan var skipað millum Fólkaflokkin, Sambandsflokkin og Miðflokkin, sendi nýggi landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Jørgen Niclasen, saman við landsstýriskvinnuni í

almannamálum, Elsebeth Mercedes Gunnleygsdóttir, boð eftir LP fyri at hoyra, hvat vit ynsktu okkum, og hvat vit kundu rokna við komandi fýra ára valskeiðið í samb. við yvirlýsing okkara. LP hevði nevniliga undan valinum, sent yvirlýsingina út til fjølmiðlarnar og allar politiskar flokkar.

Nevndin fekk á fundinum í landsstýrinum at vita, at vit neyvan komu at fáa alt, ið okkum var lovað undan valinum, men tó eitt sindur. Hetta lótu vit ikki fara óátalað aftur við borðinum. Hesin fundur var í september í fjør.

## Nýggj pensjónsuppskot

Í november vóru vit aftur í landsstýrinum á fundi við fíggjarmálaráðharran Jørgen Niclasen og almannamálaráðkvinnuna Elsebeth Mercedes Gunnleygsdóttir.

Hesuferð fingu vit framlagt 3 lógaruppskot, sum vit ikki høvdu fingið til hoyringar, men sum borin vóru í løgtingið sama seinnapart. Eitt var um almannapensjónir o.a. (ein lækking av mótrokning). Eitt annað var áseting og javning av almannaveitingum (hækking av grunduppphædd og lækking av frádráttarfríari inntøkuupphædd). Og hitt triðja uppskotið var um áseting av skatti (Ásetingarlógin) (skattafrádrátt uppá kr. 6000,- um árið til fólkapensjónistar).

Sambært landsstýrinum var endamálið við uppskotunum at betra um fíggjarligu viðurskiftini hjá fólkapensjónistum og gera treytirnar lagaligari hjá teimum fólkapensjónistum, sum hava inntøkur aftrat fólkapensjónini.

Eftir at hava viðgjørt lógarpakkan gjørdu vit í hoyringssvari okkara Almannamálaráðnum 14 dagar seinni og Løgtingsins Trivnaðarnevnd greitt, at gott nokk vóru ávísar betringar í uppskotunum, men vit vóru vónbrotin, tá tað m.a. kom til at eggja pensjónistum til at arbeiða. Okkum dámdi ikki uppskotið, har frádráttarfría inntøkuupphæddin skuldi úr ávikavíst 61.900 kr. og 60.000 kr. heilt niður í 40.000 kr. Nevndin var og er av tí sannføring, at hetta kemur at føra við sær, at áhugin hjá pensjónistum at arbeiða minkar.

Landsfelagið mælti tí landsstýrinum í hesum sambandi at broyta lógaruppskotið.

Men ávísar betringar vóru hóast alt í samlaða pensjónslógarpakkanum, har t.d. mótrokningarprosentið í viðbótini varð lækkað, og har ein skattafrádráttur var uppá 500 kr./mð.
LP tók undir við, at mótrokningarprosentið lækkaði úr 60 % niður í 20 %.

## Dagpeningur vegna sjúku

Eitt annað uppskot, sum vit í vár hava verið á fundi hjá Løgtingsins Trivnaðarnevnd við, er uppskotið um dagpening vegna sjúku og at pensjónistar á arbeiðsmarknaðinum skulu varðveita henda rætt, hóast farnir um tey 70 árini.

Verandi dagpeningalóg ásetir nevniliga, at dagpeningur vegna sjúku fellur burtur frá tí, tú fært fólkapensjón, og rætturin til dagpening fellur altíð burtur, tá ein hevur fylt 70 ár.

Nýggja uppskotið gongur m.a. út uppá at strika

aldursmarkið, tá tað kemur til dagpening, og tað samsvarar samstundis við ynski Landsfelag Pensjónista, antin vit eru 60 ár, 70 ár ella 80 ár, at munur ikki eigur at verða gjørdur á fólki.

## Landskassasparingar rakar fólkapensjónistar

Í samb. við fíggjarlógaruppskot løgtingsins 2021 boðsendi Trivnaðarnevnd løgtingsins Landsfelag Pensjónista á fund týsdagin í hesi vikuni. Í fíggjarlógini, sum telur fleiri hundrað síður, eru m.a. tvey uppskot, sum hava við pensjónistar at gera.

Almannaráðið umber seg við, at hvørki av uppskotunum hava verið til ummælis hjá teimum, uppskotini eru ætlað, eftirsum stundir ikki hava verið til tess. Annað er um útseting av javningarprosentum til almannaveitingar til útgjald frá 1. januar 2022 í staðin fyri 1. januar 2021 januar, sum upprunaliga samtykt.

Hesa útsetingarætlan mótmælti Landsfelagið. Hitt broytingaruppskotið er um almenna heilsutrygd. Tað gongur í høvuðsheitum út uppá at hækka procentvísa mánaðarliga heilsutrygdargjaldið úr 0,60% til 0,70% og at broyta galdandi tilskotsstiga, soleiðis, at landskassin fær umkl. 11,5 mió. kr. meira í inntøku um árið.

Aftrat gongur sama broytingaruppskot út uppá, at pensjónistar sjálvir skulu gjalda meiri fyri heilivág frá 1. januar komandi ár, enn vit higartil hava goldið, áðrenn Heilsutrygd tekur 100% við.

Samb. núgaldand tilskotsstiga, gjalda vit kr. 1.356,50, áðrenn Heilsutrygd tekur 100% við. Men aftaná 1. januar 2021 skulu vit til at gjalda slakar 470 kr. meiri, nevniliga kr. 1.825, áðrenn Heilsutrygd tekur 100% við.

Heldur ikki hesum broytingaruppskotið innan heilsutrygd kundu vit taka undir við. Tað gjørdu vit Trivnaðarnevndini hjá løgtinginum greitt á fundinum týsdagin.

## Fyrilestur í Norðurlandahúsinum

Í september 2019 hevði 76 ára gamli norski professarin Jon-Roar Bjørkvold fyrilestur í Norðurlandahúsinum, sum hann kallaði "Tað musiska menniskja". Fyrilesturin var lagdur soleiðis til rættis, at evnið var serliga viðkomandi fyri pensjónistar.

Hetta var ein sera áhugaverdur fyrilestur um menniskjað, hvussu ófødda barnið longu í móðurlívi verður ávirkað av røddini og lagnum hjá mammuni og pápanum.

Fyrilesturin hjá norska professaranum var fingin í lag í samstarvi millum leiðaran í Spaniastovu í Klaksvík, Andras Joensen, og Norðurlandahúsið. Um 30 fólk lýddu á fyrilesturin.

## Formansfundur

Formansfundur var 20. september 2019, har uppskot um viðtøkubroytingar var framlagt og tikið varð undir við ætlanini at hava eykaaðalfund um hetta sama mál ein mánað seinni.



***Laila Hentze og Maria Skaalum Petersen greiða frá verkætlanini***

Á sama formansfundi greiddi Alfred Olsen, nevndarlimur, frá nýggju lógini um pensjónir, sum skuldu koma í gildi 1. januar 2020, og har hjún kundu velja, um tey vildu hava útgjald sum hjún ella støk.

Eykaaðalfundurin var longu 19. oktober í samb. við smáar broytingar í viðtøkunum, og var broytingaruppskot nevndarmeirilutans samtykt.

Orsøkin til eykaaðalfundin var at gera gomlu viðtøkurnar so skilligar, at eingin ivi skal verða um, hvør tað er, ið innstillar valevni til Landsfelagið, tá aðalfundur er. Tað eru nevniliga limafeløgini, og ikki einstakir limir uttanum sítt egnað limafelag.

(47 limir úr ymsu limafeløgunum møttu á fundi, sum hildin varð í hølum Havnar Arbeiðskvinnufelags í Bøgøtu í Havn. Broytingaruppskotið frá nevndarmeirilutanum varð samtykt við 31 atkvøðum).

## Verkætlan innan eldraøkið

Nevndin kundi hugsa sær at vita, hvussu okkara elstu borgarar í aldrinum 75+ hava tað og í tí sambandinum skipa fyri eini Gallup-kanning.

Á formansfundi í heyst greiddu Maria Skaalum Petersen, leiðari fyri Deplinum í Heilsu- og Almannagransking, og Laila Hentze, stjóri fyri Gallup Føroyum, frá, hvussu hetta kundi gerast. Saman við fundarluttakarunum komu nógv uppskot um, hvat spyrjast kundi um.

Hesum hevur verið arbeitt við líka síðani. Søkt varð um pening til verkætlanina, og varð okkum í vár játtað 308.350 kr. úr Sjúkrakassagrunninum til arbeiðið. Loyvi skuldu fyrst fáast frá ymsum myndugleikum m.a. Dataeftirlitinum, tí kanningin, sum er anonym, fevnir um persónsupplýsingar. Elektron er eisini við í hesum arbeiði.

Eftirsum loyvið frá Dataeftirlitinum ikki er komið fyrr enn fyri nøkrum døgum síðani og orsaka av Korona, fer verkætlanin ikki í gongd fyrr enn komandi vár.

## Talgildu Føroyar

Landsfelag Pensjónista hevur fingið samstarv við Talgildu Føroyar í sambandi við Talgildan Samleika. Umboð fyri Talgildu Føroyar greiddu okkum á einum formansfundi frá arbeiðinum, og hava vit líka síðani havt samskifti við tey. Tað er frívilligt, um vit sum pensjónistar yvirhøvur vilja knýta okkum í hesa skipan ella ikki. Tað er ein avgerð, hvør einstakur okkara sjálvur ger av, tí Talgildi Samleikin er ikki

ásettur við lóg. Henda verkætlan hevur verið royndarkoyrd í summar og í heyst. Hon er liðug nú og tikið verður samanum heilt skjótt. Um 100 fólk hava verið við í royndarkoyringini, m.a.forkvinnan í LP, og tað hevur ikki gingið so væl, sum ein kundi hugsað sær.

## Ársveitslan

Ársveitsla var 26. oktober 2019 í Sjónleikarhúsinum í Havn. Kvøldið eydnaðist avbera væl við døgurða, røðum og dansi.

Sjónleikarhúsið var fullsett. 142 pensjónistar møttu. Gestarøðari var Kári P. Højgaard, fyrrverandi løgtingslimur og landsstýrismaður.

Vegna Koronu hevur eingin ársveitsla verið í ár, men vit seta nøsina fram móti, at hon verður 20. mars 2021 í umbygdu Siloini hjá Saltsøluni á Vestarubryggju í Tórshavn.

## NSK-fundur í Finlandi

Forkvinnan og skrivarin luttóku á fundi í NSK, Nordisk Samarbets Kommité, 30. og 31. oktober 2019 í Helsingfors, har høvuðsevnið var fátækradømi millum pensjónistar. Eisini løgdu øll norðurlendsku limalondini fram frágreiðing um, hvat hent var í teirra londum síðani seinasta NSK-fund. Í mai í ár skuldi NSK havt ársfund í Føroyum, men vegna Kovid-19 er fundurin útsettur til mai 2021.

Ein annar fundur, heystfundurin hjá NSK, verður komandi mikudag. Orsakað av Korona fer hesin NSK-fundur fram sum ein videofundur í tríggjar tímar út í eitt frá kl. 08 til kl. 11.

## Blaðið Eldri

Blaðið Eldri kom út í november 2019 í einum størri upplagi enn undanfarnu ár, og eru vit farin í gongd við komandi blað, sum fer til prentingar, so skjótt aðalfundurin hevur verið. Onkrir snøklar vanta enn.

## Ymiskt

LP hevur fingið nýggja heimasíðu, sum eitur Eldri.fo, nýggja teldupostadressu, lp@eldri.fo, og telduskipanin er dagførd, so vit kunnu hava videofundir við Teams. Eisini verður arbeitt við nýggjari journalskipan.

## Uppá tvørs

Nú er aðalfundur. Tað snýr seg um at atkvøða rætt í samband við nevndarval og atkvøða fyri valevnum, ið vilja Landsfelagnum alt tað besta. Tað snýr seg somuleiðis um at atkvøða fyri tveimum valevnum, ið vilja arbeiða samsvarandi galdandi viðtøkum felagsins.

Nevndin telur fimm limir. Vanliga eru nevndir samdar aftaná fundarlok og møguligar ósemjur verða hildnar innanfyri teir fýra veggirnar. Hetta hevur ikki borið til seinastu tvey árini, har ein av nevndarlimunum hevur koyrt solo, og lagt seg uppá tvørs tær fáu ferðir, viðkomandi hevur møtt á fundi - og allar tær mongu ferðirnar, viðkomandi ikki hevur møtt upp.
Takk fyri.

**Beate L. Samuelsen, forkv.**
**Landsfelag Pensjónista**
**24. oktober 2020**

# OYS, OYS, HÁRIÐ ER PENT

**Summi hata tær fyrstu gráu strýggirnar, onnur elska tær**



***Tekstur: Elna L. Strøm***

Tá vit eldast, vita vit, at tað uppá ein ella annan hátt merkist. Kreftirnar eru ikki tær somu sum fyrr, húðin er ikki so elastisk, sum hon var fyrr. Sokallaðir "livurblettir" eru við eitt meiri sjónligir enn bara fyri nøkrum vikum síðani, og giktin er farin at spøkja.

Sambært speglinum sæst knappliga ein rukka í andlitinum, sum tú ikki var varug við í gjár.

Ups, og so eru tað nøkur grá hár, sum tú ikki fyrr enn nú uppdagar í hesum sama spegli. Gráu hárini sóust ikki í gjár, men kanska tú líka sum skúgvaði veruligu myndina av gráu strýggjunum til viks, tí tú ikki vildi síggja tey.

Undantikið hetta við tí gráa hárinum, hevur tú tað annars gott. Ella tað kann eisini vera, at tú gleðist yvir tað gráa hárið, sum so við og við ger, at tú innan alt ov leingi er gráhærd.

Her kann líka viðmerkjast, at tað ikki bara er aldurin, ið ger, at hárið gránar. Tað kann verða ættarbregði. Vit vita um familjur, har fyrstu gráu hárini koma til sjóndar, hóast tú júst er farin um tey 30 árini.

## Fleiri atlit skulu takast

Vit eru ikki øll líka. Summi eru glað fyri grátt hár, onnur ikki. Tað er upp til ein sjálvan, hvussu man vil hava hárið, stutt, sítt, purlut ella slætt.

Og tað er eisini tú sjálv/ur, sum hevur endaligu avgerðina.



Men ivast tú, so er at søkja sær ráð á eini hárfríðkanarstovu, har tú plagar at vera klipt/ur. Har vita tey, hvørja frisuru, tú klæðir – og vónandi tora tey eisini at siga, hvørja frisuru, tær als ikki klæðir. Atlit skal jú eisini takast til høvurform, o.l.

Eftir sum tú ikki longur ert tannáringur, kann vera, at tíðin er komin, at tú skalt til at broyta "stíl", sum tey rópa tað.

## Tannáringatíðin farin

Spurningurin er, um tú torir at taka við nýggjum avbjóðingum ella um tú framvegis sjálv/ur trýrt, at tú ert 25 ár og letur teg í sambært tí ynskitankanum.

Spurnartekin kann eisini setast við, um tú vilt síggja veruleikan í eyguni og viðurkenna, at tú ert pensjónistur, letur teg í samsvarandi aldrinum,  ella tú velur at fylgja góðu persónligu frisururáðunum frá hárfríðkanarfólkinum, sum kennir teg og tína persónligheit.

Tað týdningarmesta er, at tú kennir teg væl aftan á eina góða klipping og/ella liting. Hárfríðkanarfólkið kann eisini geva tær eina góða vegleiðing, hvørji merki eru best til júst tín. Tí tað er ikki líka mikið, hvussu vit sum pensjónistar pleyga hárið við hús.



# AVSLÁTTARAVTALUR HJÁ LANDSFELAG PENSJÓNISTA

NOVEMBER 2020

Landsfelag Pensjónista hevur fingið nógvar góðar avsláttaravtalur við handlar, hotell, matstovur og aðrar fyritøkur kring landið.

Limirnir í teimum 16 lokalfeløgunum kring landið kunnu fáa avláttur úr 5% upp í 20% av vørum og tænastum.

Avslátturin er treytaður av, at limur vísir fram persónligt limakort frá Landsfelag Pensjónista.

Limirnir fáa limakort við at venda sær til sítt lokalfelag og nýggir limir við at tekna seg hjá lokalfelagnum.

## Í Tórshavn

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Hoyrnin** | **10%** | Av hoyritólum | 321731 |
| **Hennara** | **10%** | Av øllum vørum uttan tilboðsvørum | 274075 |
| **Hans Joensen**<br>Mannfólkaklæðir | **15%** | Av øllum vørum | 317210 |
| **Fótbúni**<br>Skósøla | **10%** | Av øllum vørum | 311705 |
| **Gunnvá**<br>Damuklæðir | **15%** | Av øllum vørum | 214206 |
| **Toscana** | **10%** | Mán. til hósd. og sunnudag | 211109 |
| **Angus Steakhouse** | **10%** | Av øllum mati mánadagar | 717777 |
| **Hotel Hafnia** | **15%** | Frokostbuffet í matstovuni og av øllum á Kafé Kaspar | 313233 |
| **Hornið, SMS** | **10%** | Av øllum vørum | 233423 |
| **Fljóðið sp/f** | **10%** | Av øllum vørum | 311718 |

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Jógvan Weihe** | 10% | Av øllum vørum | 353897 |
| **Vouge** kvinnuklæðir | 10% | Av øllum vørum uttan tilboðsvørum | 312380 |
| **Hjá Kissa** | 15% | | 311395 |
| **Teldutænastan** Smyrilsvegur 7 | 15% | Av øllum vørum uttan tilboðs- og útsøluvørum. Av telduumvælingum | 616100 |
| **Bailine** | 10% | | 280554 |
| **Tórshavnar Maskinhandil** | 15% | Av øllum vørum uttan tilboðsvørum | 313442 |
| **Hitapumpur.fo** | 10% | Av hitapumpum við montering. Um 3 keypa saman | 212204 312204 |
| **Køtlum** | 10% | Hárviðgerð | 312299 |
| **Touché** Mótahandil | 10% | Av øllum vørum uttan tilboðsvørum | 603300 |
| **Nordcar** | 10% | Av dekkum og felgum | 363738 |
| **P/F Waag** | 20% | Av dekkum | 323666 |
| **SRI** Máling | 10% | Av øllum uttan glasvevi | 313030 |
| **in•tone clinic** | | Viðgerð við infrareyðum hitateppi. 1. viðgerð 100 kr., fylgjandi viðgerðir 150 kr. | 516114 |
| **Salong Liljan** Torfinsgøta 6 | 15% | Hárviðgerð, mán.-fríggj. fyri kl. 13 | 314768 |
| **Lampubúðin** Dr. Jacobsensgøta 9 | 15% | Av øllum lampum og øðrum elvørum | 317303 281303 |

## Í Vágum

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Unicar** | 10% | Av øllum leigubilum | 263546 |
| **Frisørsalongin MidWay** | 15% | | 213055 |
| **HA-bilar** við Hallur Berg | 10% | Av arbeiðsløn upp á bilumvælingar | 220021 |
| **Salong Aura** | 15% | Av arbeiðsløn, hárviðgerð | 215499 |
| **Nest,** kafé og matstova | 10% | Av øllum mati | 308888 |
| **Ur og brillur** | 10% | Av øllum brillum | 447950 |

## Í Sandoy

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Búrhandilin** | 10% | Av tógvi og gávulutum | 361519 |

# Í Norðoyggjum

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Linsan Optik** Stoksoyrarvegur 16 Klaksvík | 15% | Av brillustellum og -gløsum | 313133 |
| **Sjómansheimið** Hotel Klaksvík | 10% | Av leigan av kømrum | 455333 |
| **JAP,** klædnabúð | 10% | | 456880 |
| **Vera Klipt** | 10% | Av allari hárviðgerð | 455677 |
| **Hvíthús** | 10% | Av klædnavørum | 455353 |
| **Seymistovan Hei-Mai** | 15% | | 457162 |
| **Leivur Ellingsgaard** | 10% | Ur, gull, silvur, brillur | 455203 |
| **Hjá Skós** | 10% | Av øllum skóm | 455057 |
| **Angus Steakhouse** | 10% | Av øllum mati mánadagar | 457777 |
| **El-in** | 5% | Av øllum vørum, undantikið tilboðsvørum | 284513 |
| **Norðoya Litbúð** | 15% | | 457300 |
| **Klaksvíkar Autolakering** | 10% | Av øllum vørum | 458787 / 288787 |
| **Bil & Dekkverkstaðið** Við John Heinesen | 10% | Av øllum billutum | 456959 / 217861 |

# Í Suðuroy

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Hotel Bakkin** | 10% | Av øllum mati | 373961 |
| **Richard B. Thomsen & Søn Timburhandil A/S** | 20% | Við kontantsølu | 661000 |
| **Glasstovan á Tvøroyri** Tvørávegur 25 | 10% | Av øllum mati | 790064 |

# Í Eysturoy

| | | | |
|---|---|---|---|
| **Diana** | 10% | Av øllum hondarbeiði og ítrivsvørum uttan toy til føroyska búnan, seymimaskinum og lampum | 448125 |
| **Ur og brillur** | 10% | Av øllum brillum | 447950 |
| **Rokoko,** klædnahandil | 10% | Av øllum klæðum | 441039 |
| **Brá,** mótahandil | 10% | Av øllum vørum uttan tilboðsvørum | 422727 |
| **Shari,** mótahandil | 10% | Av øllum vørum uttan tilboðsvørum | 454646 |
| **Skósøla** við Terje Hansen | 10% | Av øllum vørum | 441018 |
| **Josi,** klædnahandil Við S. Danielsen | 10% | Av øllum klædnavørum og skóm | 441450 |

# YVIRLIT YVIR PENSJÓNISTA- OG ELDRAFELØGINI Í FØROYUM 2020

**Landsfelag Pensjónista**
**Løkjatún 1, 160 Argir, tlf. 219394,**
**t-post: lp@eldri.fo,**
**heimasíða: www.eldri.fo**

**Limafeløgini:**

**1. Pensjónistafelagið Hugni**
Ninni Olsen, forkvinna, Stangavegur 138,
700 Klaksvík, tlf. 455543 og 215543,
t-post: marjun.joensen@gmail.com
Limatal: 118
Stovnað: 19.10.1971

**2. Eldrafelagið Fjallið**
Jón úr Konoy, formaður, Gásamýri 13,
520 Leirvík, tlf. 443131 og 220931,
t-post: jonkonoy@gmail.com
Limatal: 170
Stovnað 18.03.1991

**3. Eldrafelagið Borgin**
Toftagøta 9, Fuglafjørður,
Áshild Kristiansen, formaður,
Fjalsvegur 6, 530 Fuglafjørður,
tlf. 214621 og 580025,
t-post: ashild.kristiansen@skulin.fo
Limatal: 164
Stovnað 16.02.1985

**4. Oyndarfjarðar Pensjónistafelag**
Frank Anthoniussen, formaður, Norðuri í Bø 17,
690 Oyndarfjørður, tlf. 213851,
t-post: frankoyndar@hotmail.com
Limatal: 8
Stovnað 02.10.1991

**5. Eldrafelagið á Toftum**
á Kneysum 14, Toftir, Alfred Olsen, formaður,
Rókavegur 24, 656 Saltnes,
tlf. 447960 og 210960,
t-post: alfred-olsen@kallnet.fo
Limatal: 65
Stovnað 09.09.2015

**6. Eldrafelagið Nón**
Laura Olsen, forkvinna, Geilagøta 5,
640 Rituvík, tlf. 448622, 748622,
t-post: laurarituvik@gmail.com
Limatal: 192
Stovnað 16.09.1987

**7. Eldrafelagið Kumlá**
Elias Hansen, formaður, Skálavegur 92,
480 Skála, tlf. 441188,
t-post: eliassonja@gmail.com
Limatal: 60
Stovnað 15.02.1992

### 8. Pensjónistafelagið í Sjóvar Sókn

Martin Rasmussen, formaður, Fossagøta 6,
490 Strendur, tlf. 448611 og 220864,
t-post: martin@olivant.fo
Limatal: 80
Stovnað 24.10.1988

### 9. Eldrafelagið á Eiði

Knút Vesturdal, formaður, Korndalsvegur 26,
470 Eiði, tlf. 423014 og 223525,
t-post: vesturdal@vesturdal.com
Limatal: 76
Stovnað 26.03.2009

### 10. Sunda Pensjónistafelag

Vibeke Ingvarsson, forkvinna,
Norðskálavegur 36, 460 Norðskáli,
tlf. 267346 og 422226.
t-post: v_ingvarsson@hotmail.com
Limatal: 52
Stovnað 03.02.1985

### 11. Pensiónistafelagið í Havn

Høgni Højgaard, formaður, Mýrisnípuvegur 15,
100 Tórshavn, tlf. 313281 og 278080,
t-post: hh-m15@olivant.fo
Limatal: 305
Stovnað 20.05.1976

### 12. Eldrafelagið Vesturskin

Jákup Hummeland, formaður, Niðarivegur 51,
350 Vestmanna, tlf. 424102 og 250443,
t-post: e.hummeland@gmail.com
Limatal: 84
Stovnað 28.05.1984

### 13. Vága Pensjónistafelag

Lydia Laksafoss, forkvinna, Tormansbakki 3,
370 Miðvágur, tlf. 333190 og 503286,
t-post: lydialaksafoss@yahoo.dk
Limatal: 123
Stovnað 30.11.1981

### 14. Pensjónistafelagið "Kvøldarsól"

Birgit Hentze, forkvinna, 240 Skopun,
tlf. 361330, t-post: birgithentze@gmail.com
Limatal: 12
Stovnað 29.04.1982

### 15. Pensjónistafelagið HØFT

Jens Johannesen, formaður, Heiðatrøðin 5A,
800 Tvøroyri, tlf. 571770 og 371770,
t-post: jaj@kallnet.fo
Limatal: 35
Stovnað 28.12.1981

### 16. Pensjónistafelagið í sunnaru helvt av Suðuroy

Ingeborg Vinther, forkvinna, Geilin 38,
900 Vágur, tlf. 573427,
t-post: vinther@mail.fo
Limatal: 60
Stovnað 19.09.1985



# Eldri


**Landsfelag Pensjónista**

Løkjatún 1 • FO-160 Argir
Tel: 21 93 94
T-postur: lp@eldri.fo
www.eldri.fo